## Kreppan verri eystanfyri



Altjóða fíggjarkreppan hevur havt við sær, at munurin millum Vesturevropa og Eysturevropa er vorðin størri, enn hann hevur verið, síðani Berlinmúrurin og Jarntjaldið fullu. Tað skrivar Politiken. Millum annað hevur kreppan havt við sær, at nógvir vesturevrioepiskir bankar eru givnir at fíggja virksemi í teimum eysturevropeisku londunum. Teirra millum eru fleiri norðurlendskir bankar sum Nordea, Danske Bank, Sweabank og SEB, ið tilsamans hava veitt næstan 700 milliardir krónur í fígging í gamla Eysturevropa.

## Sharialóg í Kekenia

Forsetin í Kekenia, Kadyrov, er nú talsmaður fyri at brúka tær illa lýddu sharialógirnar at revsa lógbrótarar eftir. So seint sum í gjár vardi hann, at kvinnur eru offur fyri ærudrápi. Orð hansara høvdu samband við, at sjey kvinnur vórðu funnar deyðar í kekenska høvuðsstaðnum Grosnij fyri stuttum. Tær vóru skotnar. Kadyrov segði í gjár, at tær sjey kvinnurnar høvdu livað í léttsinni, og at teirra skyldmenn gjørdu tað rætta, tá teir beindu fyri teimum. Politiskir eygleiðarar siga, at kekenski forsetin roynir at styrkja sína støðu og at gera vart við mótvegis Russlandi.





# Partrolarar rokast í upsa

**Seinastu dagarnar hava nógvar landingar verið í Saltangará, og landarar hjá Landingarmiðstøðini í hava havt úr at gera**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Partrolararnir hava seinastu dagarnar havt rokfiskiskap. Eftir fáum døgum á fiskileið sigla skipini fullfermd til lands, og í Saltangará hava teir 25-35 menninir, sum hava við landingarnar at gera, havt úr at gera.

Seinasta fríggjakvøld arbeiddu teir soleiðis til klokkan 01.30, áðrenn seinastu fiskarnir vóru komnir upp úr skipunum.

### Seks trolarar

Fríggjadagin landaðu ikki færri enn seks skip í Saltangará.

Partrolararnir Bakur og Stelkur høvdu 345.000 pund, Polarhav og Stjørnan høvdu 480.000 og Jaspis og Ametyst høvdu sløk 300.000 pund.

Leygardagin vóru aftur tvey skip inni. Tað vóru Rókur og Lerkur (mynd), sum høvdu sløk 350.000 pund.

### Góður upsi

Í Saltangará siga tey, at partrolararnir seinastu dagarnar hava siglt fullir undir lúkurnar og upsin, sum skipini fáa, hevur verið stak góður.

Í dag var eingin landing í Saltangará, og týsdagin verður neyvan heldur nøkur landing.

- Vit vænta Heyk og Falk sum teir fyrstu bátarnar, og teir koma helst inn at landa mikudagin ella hósdagin, siga tey á Landingarmiðstøðini í Saltangará.



*Leygardagin landaðu Rókur og Lerkur tilsamans 350.000 pund í Saltangará. Seinni í vikuni koma Heykur og Falkur inn at landa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*